# Útbyggja innan




Mikudagin 1. juli kl 10.00 letur Vøruhúsið á Hjalla dyrnar upp til handilin, sum tá er vorðin 1000 fermetrar størri. Og av tí at vørunøgdin er tann sama sum áðrenn útbyggingina, verður gott pláss hjá viðskiftafólki at ganga millum hillarnar og síggja, hvat er at fáa í handlinum. Tað hevur verið eitt sindur trupult at fáa eyga á allar vørurnar í gamla handlinum, men tann trupulleikin er sanniliga burtur nú.

## Ein grýta og onnur

Har er t.d. ein stórur veggur bara við grýtum. Greinaskrivarin sá í minsta lagi 12 ymiskar støddir av grýtum og mangt slíkt av pannum, og góða plássið ger tað lætt at yvirskoða. Grýturnar fáast stórar til familjur við fleiri børnum ella smærri til tann, sum júst flytur heimanífrá og einans skal matgera til sín sjálvs. Har eru bíligar grýtur og pannur at fáa, meðan aðrar kosta meira, tí dygdin hevur meira at siga hjá summum.

Útbyggingin hevur sjálvandi gjørt tað eitt sindur óhøgligt hjá kundunum seinastu tíðina, og tí hevur verið neyðugt við skeltum ymsastaðni, har Vøruhúsið umber seg fyri óruddið. Ein dagin fingu kundarnir tó høvi til at arga starvsfólkið eitt sindur, tí onkur hevði ikki tikið skeltið niður har, ið tað var ruddað so væl sum ongantíð fyrr.

## Í nýggjum hami

Vanliga kenna vit Vøruhúsið sum handilin, har tey selja isenkram, máling, innbúgv og tilfar til gólv, og hóast stílurin verður eitt sindur broyttur, so verður eingin broyting í vøruúrvalinum, men heldur hvussu og hvar vøran verður sett fram.

Har ið málingadeildin var áður, verður framvegis máling at fáa, men tað verður bert til yrkisfólk.

Málingin til vanliga húsarhaldið verður at fáa til vinstru beint sum tú kemur inn í handilin – tað er har, ið dustsúgvarar v.m. vóru fyrr.

Ísenkram og nakað av innbúgv- 'inum verður nú í nýumvældu hølunum, har ið handilin higartil hevur verið. Tey eru væl ávegis at seta alt upp, og tað fer at undra kundan, at, at tað veruliga er sama nøgd av vøru sum undan útbyggingina.

Sum sagt er ein ørgrynna av grýtum og pannum at fáa umframt alt annað til køkin.

Uppiá verður sum áður møbladeild og gólvdeild. Møblarnir fara nú at vera bíligari enn teir hava verið seinnu árini, tí sum støðan nú er í landinum, er trupult at selja dýrar møblar.

Umframt nógva bíliga vøru eru eisini dygdarmerki at fáa. T.d. eru teir største umboð hjá Rosendahl í Føroyum. Innast í gomlu goymsluni, sum nú er ógvuliga nosslig, eru tonsavís av amboðum. Og beint har, ið tú kemur inn í nýggju fermetrarnar, verður ein 10-krónu marknaður – stórt pláss varð sett av, so tað verður spennandi at vita, hvat verður at fáa har. Og nú summarið er, verður eisini væl av plássi sett av til ein urtagarðsmarknað, har alt møguligt til útilív í garðinum verður at fáa.

Tá ið Sosialurin var inni á gólvinum, vóru tey væl ávegis at seta vøruna upp, og tað bar væl til at ímynda sær, hvussu tað kemur at síggja út mikudagin, og á Vøruhúsinum vænta tey , at brúkarin vil brúka hálvan tíma meiri inni hjá teimum, nú ið handilin er umbygdur.

Mánadagin og týsdagin er neyðugt at stongja handilin, men hann letur uppaftur í nýggjum hami mikudagin 1. juli við nógvum góðum tilboðum.











